# Vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum

Arbeiðsumhvørvi

# Umsorganarsamrøður

April 2021

**Hvat er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum?**

Endamálið við vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er at vegleiða í, hvussu ásetingar í lóggávum skulu skiljast/tulkast. Vegleiðingar verða nýttar til:

- at greina og lýsa orð og setningar í reglunum
- at greiða frá, hvussu krøvini í reglunum kunnu verða fylgd
- at greiða frá okkara vitan um, hvussu reglur kunnu verða tulkaðar
- at greiða frá, hvussu viðkomandi lóggáva er samansett og hvørji øki hon fevnir um

**Er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum bindandi?**

Vegleiðingar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eru ikki beinleiðis bindandi fyri virki, aðrar myndugleikar, trygdarskipanir ella onnur, men vegleiðingarnar tulka reglur (lógir og kunngerðir), sum eru bindandi.

Um eitt virki hevur gjørt sum tilskilað er í eini vegleiðing, so setir Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki onnur krøv.

Virkini kunnu loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðs- og brunaeftirlitið ger tá eina meting av, um hesin hátturin er eins tryggur og hin, og um hann er í samsvari við reglurnar.

**Meiri kunning**

Meiri kunning og vegleiðing er á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum *www.arb.fo*.

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið**

**Eirargarður 2, 2. hædd**

**FO-100 Tórshavn**

**+298 66 44 00**

arb@arb.fo

## Umsorganarsamrøður

Umsorganarsamrøður eru samrøður, ið verða hildnar millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ið eru sjúkraskrivað ella sum av ymsum orsøkum ikki fáa arbeitt sum vanligt. Hetta kann t.d. vera orsakað av vantandi trivnaði í arbeiðinum, strongd ella avbjóðingum í heimalívinum. Tað er arbeiðsgevarin, ið kallar inn til umsorganarsamrøðu, tá ið hann metir, at grundarlag er fyri tí.

Endamálið við eini umsorganarsamrøðu er at vísa umsorgan fyri starvsfólkum og finna hóskandi loysnir, ið hjálpa starvsfólkinum at vera verandi í arbeiðinum, minka um sjúkrafráveru ella koma skjótari aftur til arbeiðis eftir sjúkraskriving. Endamálið við eini umsorganarsamrøðu kann tí vera:

- at vísa umsorgan fyri einum starvsfólki
- at tosa um íkomnu støðuna
- at varpa ljós á ávís viðurskifti
- at tosa um møguligar loysnir
- at tosa um møguligar tillagingar í arbeiðstíð ella arbeiðsuppgávum
- at betra um viðurskifti, ið eru orsøk til fráveru
- at hjálpa starvsfólkinum at vera verandi í starvinum
- at minka um sjúkrafráveru
- at fyribyrgja sjúkrafráveru
- at tosa um møguligt samband við starvsfólk undir sjúkraskriving
- at tosa um longd av sjúkrafráveru
- tosa um útlitini fyri at koma aftur til arbeiðis
- at tosa um afturkomu til arbeiðis eftir sjúkraskriving

Ein umsorganarsamrøða er ikki ein starvslig samrøða. Tað er umráðandi at øll starvsfólk vita, hvat endamálið við eini umsorganarsamrøðu er, soleiðis at samrøðan ikki elvir til óneyðugan ótta ella ótryggleika hjá starvsfólkunum.

Arbeiðsgevarin eigur at taka stig til umsorganarsamrøðuna, og starvsfólkið eigur at fáa møguleika at hava onkran við sær til samrøðuna. Hetta kann vera eitt álitisfólk, eitt trygdarumboð, ein starvsfelagi ella ein annar persónur. Umsorganarsamrøðan kann eisini fara fram umvegis telefon. Hetta kann t.d. vera um starvsfólkið vegna sjúkuna ikki fær møtt til eina samrøðu.

Umsorganarsamrøðan eigur at fara fram eftir einum skipaðum leisti, ið øll starvsfólk eru kunnað um. Somuleiðis eigur innkalling til samrøðuna at fylgja eini mannagongd, ið øll starvsfólk eru kunnug við. Hetta er fyri ikki at skapa ótryggleika orsakað av samrøðuni.

## Umsorganarsamrøða við sjúkraskrivað starvsfólk

Um eitt starvsfólk verður langtíðarsjúkraskrivað, kann arbeiðsgevarin kalla starvsfólkið inn til eina umsorganarsamrøðu. Umsorganarsamrøðan eigur tá, um til ber, at fara fram í seinasta lagi 4 vikur eftir fyrsta sjúkradag. Umsorganarsamrøður kunnu eisini verða hildnar í sambandi við fleiri styttri sjúkraskrivingar innan eitt ávíst tíðarskeið.

Starvsfólkið hevur ikki skyldu at greiða arbeiðsgevaranum frá um sjúkuna. Arbeiðsgevarin eigur tískil ikki spyrja, hvat starvsfólkinum feilar. Um starvsfólkið tó ynskir at práta um sjúkuna, kann arbeiðsgevarin luttaka í prátinum.

Arbeiðsgevarin eigur at greiða starvsfólkinum frá, hvat ítøkiliga endamálið við umsorganarsamrøðuni er.

Um talan er um eitt starvsfólk, ið skal byrja aftur til arbeiðis eftir longri sjúkralegu, kann ein umsorganarsamrøða fara fram, áðrenn starvsfólkið byrjar aftur í starvinum. Endamálið við hesi er tá at finna ein leist fyri, hvussu starvsfólkið skal byrja aftur í starvinum. Tað kann t.d. vera neyðugt at byrja í niðursettari tíð og so við og við økja um tímatalið.

Eftir eina umsorganarsamrøðu eigur arbeiðsgevarin at skriva ein samandrátt av tí, ið tosað var um. Starvsfólkið eigur at fáa eitt avrit av hesum.

## Umsorganarsamrøða grundað á aðrar orsøkir enn sjúkraskriving

Hevur arbeiðsgevarin varnast at eitthvørt er, ið ávirkar starvsfólkið so nógv, at starvsfólkið hevur trupult við at røkja starvið sum vanligt, kann arbeiðsgevarin kalla inn til eina umsorganarsamrøðu. Arbeiðsgevarin eigur at greiða starvsfólkinum frá, hví kallað er inn til umsorganarsamrøðu og hvat ítøkiliga endamálið við umsorganarsamrøðuni er. Niðanfyri eru dømir um spurningar, ið arbeiðsgevarin kann spyrja til eina umsorganarsamrøðu.

## Íblástur til spurningar at spyrja til umsorganarsamrøður

Til eina umsorganarsamrøðu kann arbeiðsgevarin spyrja ymiskar spurningar fyri at fáa greiðu á, hvussu støðan hjá starvsfólkinum á bestan hátt kann verða handfarin og hvørji ynski starvsfólkið hevur. Nevndu spurningarnir eru at nýta sum íblástur og til at fáa gongd í prátið. Ikki allir spurningar eru líka viðkomandi fyri øll arbeiðspláss ella starvsfólk.

**Longd á sjúkugongd og sjúkraskriving**

- Hvussu langa tíð væntar tú, at sjúkugongdin/viðgerðin fer at vara?
- Hvussu langa tíð av hesum væntar tú, at tú fert at verða sjúkraskrivað/ur og ikki kanst arbeiða?
- Eru tíðarskeið í sjúkugongdini, har tað ikki ber til hjá tær at arbeiða?
- Eru tíðarskeið í sjúkugongdini, har tað ber til hjá tær at arbeiða?

**Tillaging av arbeiðsuppgávum og arbeiðstíð**

- Kundi tú hugsað tær at arbeitt eitt sindur í tíni sjúkugongd?
- Hvussu kundi tín arbeiðsdagur sæð út hetta tíðarskeiðið?
- Eru ávísar arbeiðsuppgávur, ið tú helst vilt loysa?
- Eru ávísar arbeiðsuppgávur, ið tú helst vilt sleppa undan?
- Hvørjar arbeiðsuppgávur hóska best til tín í løtuni?
- Hevði tað hjálpt tær, um tú arbeiddi niðursetta tíð í eitt tíðarskeið?
- Er tað nakað, ið vit á arbeiðsplássinum kunnu gera fyri at tú skjótari ella lættari kanst koma til arbeiðis aftur?
- Er tørvur á at broyta tínar arbeiðsuppgávur í eina tíð?
- Er tað betri hjá tær at arbeiða á eini aðrari deild í hesum tíðarskeiðinum?
- Kunnu vit í felag leggja eina ætlan fyri, hvussu tú kemur væl í gongd aftur?

**Annað**

- Hvussu stuðla vit tær best gjøgnum hetta tíðarskeiðið?
- Er tørvur á nøkrum ávísum hjálpartóli?

- Eru viðurskifti á arbeiðsplássinum, sum eru viðvirkandi til ella orsøk til tína sjúkraskriving?
- Hvussu ynskir tú, at okkara samband skal verða, meðan tú ert sjúkrameldað/ur?
- Hvat ynskir tú, at vit siga tínum starvsfeløgum?